## Føroyskir arbeiðsgevarar røkka nú teim lesandi

Yrkistænastan er eitt nýtt átak, sum skal virka fyri at styrkja sambandið millum føroyska arbeiðsmarknaðin og tey lesandi. Yrkistænastan er ein skipan, sum vendir sær beinleiðis til føroyingar undir útbúgving við upplýsingum um leys størv. Allir arbeiðsgevarar kunnu nýta hesa tænastu, sum fer at virka frá í dag. Tað er ein sannroynd, at føroyska samfelagið einans kann bjóða ein part av teimum útbúgvingum, ið eru neyðugar í dagsins samfelagi. Tí er tað sera umráðandi, at føroyingar leita sær út um landoddarnar at nema sær førleikar, sum kunnu vera við til at bera okkara land framá. Men tað er samstundis ein trupulleiki fyri føroyska samfelagið, at føroyingar ikki venda heimaftur eftir lokna útbúgving uttanlands. Yrkistænastan er amboðið, sum tryggjar sambandið við føroyingar, meðan teir eru uttanlands í útbúgvingarørindum. Tílíkar skipanir eru eisini at síggja í londunum rundan um okkum. Tað er Uttanríkisráðið, Vinnuhúsið, Stuðulsstovnurin og Meginfelag Føroyska Studenta, sum standa fyri hesum átaki, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu síni.




Føroyska umboðið í ICES:

# Vit hava eina góða fiskiveiðiski

**Jákup Reinert, fiskifrøðingur, sum er umboð hjá Havstovuni í ráðgevandi nevndini hjá ICES, heldur, at vit hava eina góða fiskiveiðiskipan, sum er nógv betri enn ein kvotuskipan. – Hetta er ein skipan sum loyvir, at fiskastovnar og veiða eru skiftandi, men okkum vantar ein veiðisetning, sigur hann**



- Tað er ilt at siga, hvønn mun upplýsing í Bretlandi kann gera. Vit kunnu jú altíð upplýsa, men tað verður ivaleyst torført at sleppa uttan um, at veiðitrýstið í føroyskum sjógvi er ov stórt. Um veiðitrýstið ikki verður minkað við skerjingum í dagtali, kunnu vit yvirfyri umheiminum ikki siga, at okkara fiskiveiða er burðardygg, sigur Jákup Reinert, umboð hjá Havstovuni í ráðgevandi nevndini hjá ICES

Mynd: Røgvi K. Mouritsen

RÁÐGEVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hevur Sosialurin sett nógv fokus á málið um okkara fiskidagaskipan. Orsøkin er stongsulin í Bretlandi fyri virkaðari føroyskari hýsu. Bretskar handilsketur vilja ikki hava virkaða føroyska hýsu í sínum vøruútboði, tí tey vilja ikki koma í ringt ljós millum síni viðskiftafólk, tá teirra ráðgevar siga, at føroysk hýsuveiða ikki er burðardygg.

Óvirkað hýsa úr Føroyum kann tó seljast í Bretlandi, og síðan kunnu bretskir framleiðarar virka fiskin og selja hann til somu ketur, sum ikki vilja keypa fiskin virkaðan úr Føroyum. Hinvegin hava bretar viljað keypt virkaða hýsu úr Føroyum, um hon er veidd í íslendskum sjógvi, hóast íslendsk hýsa heldur onga góðkenning hevur. Munurin er ivaleyst, at hýsuveiða undir Íslandi verður mett at verða burðardygg.

Hetta undrar eitt nú føroyskar línumenn sum siga, at minni er at fáa av hýsu undir Íslandi enn undir Føroyum – og at føroyska hýsan er betri enn hin íslendska.

### Ikki bara hýsa

Seinasta hósdag hevði Sosialurin samrøðu við Olaf Olsen, fyrrverandi skipara, reiðara og politikara um veiðitrýst, og fríggjadagin høvdu vit samrøðu við Hjalta í Jákupsstovu um somu spurningar.

Í morgun hava vit skift orð við Jákup Reinert, fiskifrøðing, sum umboðar Havstovuna í ráðgevandi nevndini hjá altjóða havgranskingarstovninum ICES, sum verður rópt ACOM.

Jákup Reinert sigur, at tað er ikki bara hýsustovnurin undir Føroyum, sum hevur verið illa fyri seinnu árini, men eisini toskastovnurin.

Hann vísir á, at trýstið á upsastovnin er eisini í hægra lagi, men tað er ikki katastrofalt, sum fiskifrøðingurin tekur til.

Hann vísir á, at tað er lutfalsliga lættari at gera nakað til tess at ansa betri eftir toskaveiðini enn eftir hýsuveiðini.

- Tað ber til at ansa eftir leiðunum, har toskur veksur upp við friðingum, meðan hýsa ferðast meiri víða um og er tí verri at ansa eftir. Vit kunnu ikki í sama mun tosa um hýsuleiðir á sama hátt, sum vit kunnu eyðmerkja toskaleiðir

Jákup Reinert er púra samdur við Hjalta í Jákupsstovu um, at dagatalið í fiskidagaskipanini er alt ov stórt.

- Tað týdningarmesta í øllum hesum er tí at minka um dagatalið í skipanini, leggur hann aftrat.



### Veiðisetningur

Tað er ikki sørt, at útsøgnin hjá fiskifrøðini um, at veiðitrýstið er ov stórt, undrar fiskimenn. Fiskifrøðin var við til at gera fiskidagaskipanina, og tá fleiri túsund dagar í dag liggja óbrúktir í skipanini, átti veiðitrýstið í prinsippinum ikki at verið ov stórt.

Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður og fyrrverandi fiskimálaráðharri, hevur fleiri ferðir víst á, at einir 18.000 fiskidagar liggja óbrúkti í skipanini.

Er veiðitrýstið tá kortini ein trupulleiki, spurdu vit